skemt








# Um kvinnurnar ráddu

Heimurin hevði ivaleyst sæð øðrvísi út, um kvinnurnar høvdu havt størri vald enn menninir. Her hevur onkur gjørt nøkur dømi um, hvussu heimurin kundi verið øðrvísi.

## Hvussu ger man



Franski forsetin Nicolas Sarkozy kennist ikki heilt tryggur við støðuna, tá ið hann sleppur at halda einum smábarni í einum sjúkrahúsi í býnum Neufchateau har eystri í Fraklandi. Nú er Sarkozy júst giftur við italskari modell, so tað kann verða, at hann sleppur at pápast í næstum.

## Leyst og fast um stórt og smátt

Dimma, Vikublaðið og Vinnuvitan saman. Árni Gregersen verður blaðstjóri, og Óli verður DEILDarstjóri.
Brynhild Thomsen = Kvinnuvitan

Eyðun Húsgarð er farin at keypa tvey nýggj torn til prentsmiðjuna, DIMMUBORGIR?

Addressa á øll 17.000 vikubløðini. Og eg sum helt, at tað stóð tað sama í øllum 17.000 bløðunum??

At bera Vikublaðið er vorðið ein útsettur POSTUR!

Fyrr var tað eitt spæl at ganga við posti, nú verður tað eitt MYRKAspæl.

Handan postboðslýsingin burdi verið tikin í myrkri, passar betri til komandi arbeiðstíðirnar!

# Í rangastrúpan

*Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.*

**Gekk ikki eftir vild**
Úti í Svínoy hava tey roynt við eini smoltstøð, sum lukkaðist væl. Tíverri varð hon stongd.
Alfred Olsen løgtingi

**Á útivølli í 104 ár**
Hetta tí at talan var um fyrsta landskappingardystin hjá KÍ á heimavølli
3-2 mánakvøldið

**Snildur barrdiskurin**
Skeinkja kaffi úr barrdiskinum
Sosialurin

**Hvar er Ken?**
Barbie í trupulleikum
Dimma

**Festlig samanlegging**
Frelsurnarherurin keypt Kaggan
Sosialurin

# Bush fyrireikar seg at vera pensjóneraður



Tíðin hjá George W. Bush sum amerikanskur forseti gongur móti endanum, og Bush er eftir øllum at døma farin at fyrireika seg til at verða pensióneraður sum forseti. Her gravar hann mold í einum hava í New Orleans, tí eitt træ skal plantast har. Hann fær hjálp frá kandiska forsætisráðharranum Stephen Harper og mekiskanska forsetanum Felipe Calderon. Kanska Bush kann brúkast sum gartnari eftir forsetatíðina